Vi›merking

Opi› bræv til allar politiskar flokkar á løgtingi

Sorgarleikurin á Innkrevjingini hjá Toll- og Skattstovu Føroya - ein søga um almenna umsiting anno 2000



Ódugnalig lei›sla á Innkrevjingini og ein ovasti a›alstjóri og fíggjarmálará›harri, sum hava ilt vi› at halda or›, hevur ført vi› sær at innkrevjingin av almennari skuld hjá landinum er í smildri og at milliónir av almennum pengini fara fyri skeyti. Eingin skipan er til at innheinta skuld vi› og tann sum kemur at blø›a fyri hetta er skattgjaldarin. Ta› sum hevur ligi› fremst í huganum hjá lei›sluni á Fíggjarmálast‡rinum hevur fyrst og fremst veri›, at verja sína egnu lei›slu, uttan at tey hava tiki› hædd fyri hvørjar avlei›ingarnar eru av hesum. Hetta hevur havt vi› sær, at ein vælvirkandi almenn tænasta nú er fyribeind.

Starvsfólkini á Innkrevjingardeildini vendu sær í novembur 1999 til Starvsmannafelagi›, tí arbei›svi›urskiftini á deildini vóru út av lagi vánalig. 1 mars 1999 fekk Innkrevjingin n‡ggjan lei›ara - Birgit Vitalis Ottosen. Starvsfólkini tóku væl ímóti henni, men ta› gjørdist skjótt greitt fyri starvsfólkunum, at hennara háttur at lei›a deildina gjørdi arbei›svi›urskiftini ótolandi. Hóttanir og kravbo› gjørdu at enda, at starvsfólkini kendu seg sálarliga kroyst, og ikki før fyri at virka nøktandi á arbei›splássinum. At enda orka›u starvsfólkini ikki meira og vendu sær til felagi› um hjálp.

Felagi› royndi fyrst saman vi› álitisfólkunum at fáa máli› loyst á sta›num, men uttan úrslit. Sí›ani bó›u vit um fund, fyrst vi› Birgit V. Ottesen og sí›ani Óla Heinesen, stjóra á T&S, men hetta var› avvíst. Tískil bó›u vit starvsfólkini koma á fund vi› felagi› fyri á tann hátt at fáa or› á lei›sluna og hjálpa bá›um pørtum at koma ví›ari.

Avlei›ingin av hesum er vælkend. Ísta›in fyri at lurta eftir ney›arrópinum frá sínum egnu starvsfólkum, valdi lei›slan á T&S at hótta vi› at burturvísa álitisfólkunum. Hetta hev›i vi› sær ein sjey viku langan arbei›sste›g — sum "enda›i" vi› at Fíggjarmálast‡ri› og Starvsmannafelagi› undirskriva›u eina semju.

Ta› var ikki vi› gó›um tannabiti, at vit skriva›u undir hesa semju - men vit høvdu tvey í at velja - antin at her›a strí›i›, tvs. at taka alt Fíggjarmálast‡ri› til hús, ella at trúgva uppá, at fíggjarmálará›harrin Karsten Hansen og a›alstjórin Petur Alberg Lamhauge vóru menn sum hildu or› og vóru sinna›ir at fáa vi›urskiftini í rættlag. Karsten Hansen bo›a›i frá, at um fólkini ikki komu aftur til arbei›is, so komu helst umfatandi uppsagnir uppá tal, og hetta kundu vit sum felag ikki liva vi›.

Starvsmannafelagi› ásannar, at strí›i› um Innkrevjingina er tapt. Men vit hava lært nógv av hesum, og fara ikki í framtí›ini at gera slíkar semjur vi› ver›andi lei›slu í Fíggjarmálast‡rinum.

Tá starvsfólkini koma aftur til arbei›is hava tey ikki ein men tveir lei›arar, sum halda fram vi› sama leisti. Birgit Vitalis Ottosen er flutt upp í starvstign í Fíggjarmálast‡rinum, men hevur framvegis skrivstovu á innkrevjingardeildini. Regin Thomsen er settur fyribils lei›ari í sta›in fyri hana.

Innkrevjingin av almennari skuld desentraliserast

Undir arbei›ssteg›inum avgjørdi fíggjarmálará›harrin Karsten Hansen, at tann desentralisering av innkrevjingini, sum hann hev›i tiki› avger› um skuldi leggjast út á deildir kring landi›, skuldi framskundast. Orsøkin til at desentraliseringin nú brádliga skuldi fremjast í skundi var, at fíggjarmálará›harrin ikki vildi vi›ganga at hann hev›i ein lei›slutrupulleika, og tí var ney›ugt at uppfinna eitt n‡tt starv ella starvsumrá›i til lei›aran, sum tí var sett til at standa á odda fyri desentraliseringsætlanunum. Tvs. at tann persónurin, sum øll orrustan stó›st av, kom einvegis at avgera framtí›arlagnuna hjá starvsfólkunum á Innkrevjingardeildini. Hóast ta› í semjuni var› lagt upp til, at starvsfólkini skuldu vera vi› í arbei›num, eru framvegis bert kravbo› galdandi. Starvsfólk sum hava starvast 30 ár hjá T&S fáa bo› um at tey skulu søkja síni egnu størv av n‡ggjum orsaka av desentralisering - og skulu avlevera› prógv og ummæli› vi› - ummæli› frá Birgit V. Ottosen?

Eingin grundgeving liggur fyri hví ta› er ney›ugt at desentralisera innkrevjingina av almennari skuld. Innkrevjingardeildin er júst flutt inn í n‡ggj høli, sum er innrætta› vi› n‡ggjum innbúgvi og n‡mótans útger› til 16 starvsfólk. Kostna›urin fyri hesi høli er 900 kr. fyri fermeturin. 3 mána›ar aftaná er Innkrevjingardeildin ni›urløgd.

Sambært grein 2 í sáttmálanum skulu starvsfólk ver›a vi› í arbei›inum, tá avgerandi broytingar henda á arbei›splássinum. Desentraliseringin fær eisini umfatandi avlei›ingar fyri a›rar deildir á T&S, men álitisfólkini á hesum deildum eru als ikki kunna›i um tær komandi broytingarnar.

Hvørjar eru avlei›ingarnar av sorgarleikinum?

Á›renn 1996 var tann almenna skuldin yvir ein hálva milliard, og fyri at koma hesum trupuleika til lívs, gjørdi ta› almenna íløgu í eina kostna›armikla innkrevjingarskipan og í at upplæra starvsfólk at umsita innkrevjingarskipanina. Í 1996-1999 hevur innkrevjingardeildin vi› hesi skipan, veri› før fyri at minka um eftirstø›urnar vi› 170 milliónum krónum. Hendan skipanin er nú ni›urløgd orsaka› av ár 2000 trupulleika og eftirstø›urnar vaksa vi› rúkandi fer›. Vi›merkjast kann, at hendan skipan ikki er fallin fyri ár 2000 trupulleikanum í Danmark.

Starvsfólkini á innkrevjingini og Birgit V. Ottosen vistu longu frá 1 apríl 1999, at innkrevjingarskipanin kom í trupulleikar, tí serviceavtalan av skipanini var› uppsøgd av leverandørinum. Óli Heinesen, stjóri á T&S, hevur alment sagt, at hann ikki fyrrenn 1. okt. 1999 var› grei›ur yvir, at innkrevjingarskipanin ikki klára›i ár 2000 trupulleikan. Hann hevur eisini bo›a› frá, at 90% av eini n‡ggjari skipan skuldi koma at virka frá 1. jan. 2000, men solei›is er stø›an als ikki í dag - eingin skipan fyriliggur, og ta› er ivasamt um ta› yvirhøvur eydnast at fáa eina skipan at virka í inniverandi ári.

Einki fyriliggur hvussu desentraliseringin skal virka uttan eina innkrevjingarskipan, og uttan at tey starvsfólk, sum hava royndirnar av innkrevjing eru vi› í arbei›num at gera eina n‡ggja skipan.

Stø›an í dag er at t.d.:

• Pantifútaheimildin er tikin frá teimum 8 pantifútunum, og eingin panting kann tí ver›a framd. Eftir tí desentraliseringsætlan, sum fyriliggur, ver›a bert 2 pantifútar framyvir sum skulu hava skrivstovu í Tórshavn.

• Einki ver›ur eftirhildi› á A-inntøku hjá fólki, i› skylda skatt, barnapengar, konupengar o.l.. Hetta eftirhald hevur í me›al givi› 1 1/2 - 2 milliónir um mána›an til eftirstø›ur.

• Negativt MVG og gjøld fyri rokningar til ta› almenna, ver›ur í dag goldi› beinlei›is út til borgaran, uttan at ta› fyrst ver›ur hugt eftir um móttakarin hevur skuld, sum útgjaldi› kann mótroknast í. Hendan mótrokning hevur í me›al givi› 1/2 millión um vikuna til eftirstø›ur.

• Krøv frá ø›rum myndugleika enn Toll- og Skattstovuni, t.v.s. barnapengar, konupengar, vegskattur og útlendsk krøv ver›a í dag ikki skrásett. Ætlanin er at myndugleikarnir, sum t.d. Almannastovan, sjálvi skulu skráseta og málsvi›gera hesi krøv.

• Inngjøld til a›rar eftirstø›ur enn toll, skatt og MVG ver›a bert skrásett á eini fyribilskonto, og ikki á skuldaran persónligt.

• Øll málsvi›ger, so sum t.d. avtalur, sum innkrevjingin hevur gjørt vi› borgarar, kann ikki fylgjast upp, tí eingin skipan er.

Hetta vil sostatt siga, at sí›ani november mána›a eru uml. 11 milliónir krónur farnar beinlei›is út sum gáva til skuldarar, sum av røttum áttu at veri› eftirhildnar. Hetta tali› veksur fyri hvønn dag, sum eingin skipan er.

Eingin innkrevjing er, og milliónir av almennum krónum fara fyri skeyti - einasti vinnarin í øllum hesum eru tey sum skylda landinum pengar og nú sleppa undan at gjalda. Tann sum blø›ir fyri hetta er skattgjaldarin, sum helst má av vi› fleiri pengar, tí so nógv skuld er útistandandi.

Hóast Óli Heinesen, sum er fyribilssettur stjóri, hevur ábyrgdina av at eftirstø›urnar hjá landinum, orsaka av omanfyri nevnda, fyrnast og ikki ver›a innkravdar, hevur Fíggjarmálast‡ri› longt hansara starvssetan í eitt ár.

Fakliga umhvørv i› syndrast

Avlei›ingin av øllum hesum er, at ein vælvirkandi innkrevjing hjá T&S vi› vælútbúnum starvsfólkum vi› áralongum royndum liggur í smildri. Fleiri fólk hava sagt seg úr starvi uttan at hava anna› starv í bo›i, og mestsum øll fólkini eru sálarliga ni›urbrotin. At starvsfólk vi› tí fakliga kunnleikanum siga upp hevur vi› sær at stovnurin missir vitan og royndir, sum ta› fer at taka mong ár at byggja uppaftur.

Starvsmannafelagi› mist áliti› á Fíggjarmálast‡rinum

Sjálvt máli› snú›i seg í stuttum um samstarvstrupulleikar, men tann stívrendi hátturin sum Fíggjarmálast‡ri› beinanvegin valdi at brúka móti starvsfólkunum gjørdi, at máli› fekk eina heilt n‡ggja vend. Eingin áhugi var at royna at loysa upprunatrupulleikan. Ísta›in valdi Fíggjarmálast‡ri› at broyta alt máli› til ein spurning um desentralisering, sum nú hevur ta› vi› sær at innkrevjingardeildin er ni›urløgd.

Ni›urstø›an er tann, at Starvsmannafelagi› hevur mist áliti› á Fíggjarmálast‡rinum, og vit bi›ja tí politisku myndugleikarnar um at kanna hetta máli›, solei›is at ta› fær avlei›ingar fyri røttu vi›komandi. Starvsmannafelagi› hevur roynt at funni› eina loysn. Fíggjarmálast‡ri› hevur harafturímóti bert at vart tann heilaga lei›slurættin, uttan at hugsa um hvørjar avlei›ingar hetta fyrst og fremst hevur fyri starvsfólkini, men so sanniliga eisini fyri skattgjaldaran og arbei›i› framyvir at krevja inn almenna skuld.

Tórshavn
tann 22. februar 2000
Vegna nevndina í
Starvsmannafelagnum
Gunnleivur Dalsgar›,
forma›ur

Rís og rós frá donsku andstøðuni

Andstøðuflokkarnir í Fólkatinginum taka við blandaðum kenslum ímóti nýggju donsku stjórnini. Flokkarnir á høgravonginum duga ikki at síggja nakran sjónligan bata, men eisini vinstrumegin í danska tinginum eru flokkarnir ivasamir, nú Poul Nyrup Rasmussen hevur skift ráðharrar út

Per Højgard
og Kári Durhuus
(Føroyska Tíðindastovan)

- Hvat hjálpir tað at skifta nakrar strúkarar út í symfoniorkestrinum, tá tað er heilt galið við tónleikaverkinum, og orkesturleiðarin eisini er hin skeivi?

Hendan spurningin setir Anders Fogh Rasmussen, formaður í Vinstra, sær, eftir at sosialdemokratiska Nyrup-stjórnin í gjár varð umskipað.

Hann dugur sum heild ikki at síggja nakað positivt í, at nýggir ráðharrar eru komnir í stjórnina.

- Tað er ikki av tilvild, at skiftið kemur nú. Helst hevur forsætisráðharrin havt fyri neyðini at flutt fokus frá einum ávísum máli, sigur Anders Fogh Rasmussen við donsku tíðindastovuna, Ritzau.

Hann sipar til, at hitt sonevnda Eysturríkismálið hevur havt við sær, at Nyrup hevur staðið í innanríkispolitiskum andgletti seinastu vikurnar.

Í Konservativa Fólkaflokkinum eru tey alt annað enn bilsin av, at nýggj fólk koma í stjórnina. Hinvegin heldur flokkurin, at nýggju fólkini eru ikki nóg nýggj.

- Forsætisráðharrin kundi væl havt sett saman eitt nýtt lið við nýggjum andlitum, sigur politiski framsøgumaðurin í konservativa flokkinum, Lene Espersen.

Hon vísir á, at bæði Jacob Buksti og serliga Ritt Bjerregaard eru gomul í garði í donskum politikki.

Nýggj máling á gamalt hús

Úti á høgravonginum eru hvassar atfinningar at hoyra.

- Skiftið í stjórnini er sum at sproyta nýggja málin á eitt gamalt, niðurslitið hús, áðrenn tað skal seljast.

Tað sigur formaðurin í Danska Fólkaflokkinum, Pia Kjærsgaard, sum eisini finst at, at ongi tekin eru um, at stjórnin í framtíðini fer at reka ein harðari útlendingapolitikk

Bólkurin, Frælsi 2000, ið eru fyrrverandi fólkatingslimir í Framburðsflokkinum, eru serliga óðir um, at fyrrverandi samferðaslumálaráðharrin, Sonja Mikkelsen, heldur fram í stjórnini sum heilsumálaráðharri.

- Eg vóni, at danir hava góða heilsu. Um Sonja Mikkelsen fer at arbeiða sum higartil, fáa vit stórar trupulleikar, sigur formaðurin í tingbólkinum hjá Frælsi 2000, Kim Behnke.

Vinstrivongurin ivast

Stuðulsflokkarnir hjá donsku stjórnini á vinstravonginum eru ikki líka atfinningarsamir sum høgrivongurin. Kortini eru atfinningar at hoyra.

- Vit eru ikki sannførd um, at stjórnin nú fer at reka ein politikk, ið ger, at sambandið okkara millum batnar, sigur Kjeld Albrechtsen frá Eindarlistanum.

Holger K. Nielsen frá Sosialistiska Fólkaflokkinum vil kortini ikki fara líka lang í sínum úttalilsum.

- Vit hava hvørki meira ella minni álit á stjórnini, nú hon er umskipað, sigur Holger K. Nielsen.

Poul Nyrup Rasmussen og Ritt Bjerregaard lið um lið fyri fyrstu ferð í fleiri ár

Mynd: Føroyska Tíðindastovan

Danski Føroya-politikkurin verður óbroyttur

Hóast Poul Nyrup Rasmussen, forsætisráðharri, í gjár gjørdi broytingar í donsku stjórnini, so er væntandi, at Føroya-politikkurin hjá nýggju stjórnini verður hin sami sum frammanundan.

Tað er Poul Nyrup Rasmussen sjálvur, ið umsitur Føroyar sum málsøki, og av tí at ongin broyting er gjørd í Forsætismálaráðnum á hesum sinni, so er støðan óbroytt.

Føroyar hava sum danskt málsøki ligið í Forsætismálaráðnum síðani 1948, tá Heimastýrislógin kom í gildi, og tann støðan er eisini óbroytt eftir stjórnarligu broytingarnar í gjár.

Tveir inn og tveir út

Sosialdemokratarnir Ritt Bjerregaard og Jacob Buksti teljast nú millum ráðharrarnar í donsku stjórnini, meðan Carsten Koch og Thorkil Simonsen brádliga eru fyrrverandi ráðharrar

Hóast Ritt Bjerregaard og Jacob Buksti eru nýggir ráðharrar, so eru tey alt annað enn nýggj í donskum politikki.

Ritt Bjerregaard, sum er nýggjur matvøruráðharri, hevur drúgvar politiskar royndir. Hon hevur eisini fyrr sitið í ráðharrasessi.

Jacob Buksti, fólkatingsmaður, hevur higartil verið politiskur framsøgumaður í danska javnaðarflokkinum, men nú er hann ferðslumálaráðharri.

Hann kemur í staðin fyri Sonju Mikkelsen, sum nú er heilsumálaráðharri. Fyrrverandi heilsumálaráðharrin, Karsten Koch, fekk ongan nýggjan ráðharrasess.

Fyrrverandi matvørumálaráðharrin, Henrik Dam Kristensen, tekur við sum nýggjur sosialmálaráðharri eftir Karen Jespersen. Hon hevur fingið gamla sessin hjá Thorkil Simonsen, ið var innanríkisráðharri.

Thorkil Simonsen hevur tikið seg heilt burtur úr politikki, meðan hin fyrrverandi ráðharrin, Karsten Koch, heldur fram sum fólkatingsmaður.

Ongin av radikalu ráðharrunum vórðu skiftir út, og tað merkir, at nú eru nýggju kvinnur og ellivu menn í fjórðu stjórnini hjá Poul Nyrup Rasmussen.

Áhugin er stórur. Ein ørgrynna av tíðindafólkum settu forsætisráðharranum og nýggja matvøruráðharranum, Ritt Bjerregaard, ágangandi spurningar

Mynd: Føroyska Tíðindastovan

Nýggi matvørumálaráðharrin, Ritt Bjerregaard (høgrumegin), undir liðini á fyrrverandi matvørumálaráðharranum, Henrik Dam Kristensen, sum nú er sosialmálaráðharri. Ytst vinstrumegin Sonja Mikkelsen, fyrrverandi ferðslumálaráðharri og núverandi heilsumálaráðharri

Mynd: Føroyska Tíðindastovan